# FØROYA HAVA S TRYGGJA SÆR SÍ

**- Eg meti tí, at tað er okkara skylda at skapa okkum besta grundarlagið undir einum nýggjum býtislykli. Undanfarin ár hava vit hava veik tøl at halda okkum til, tí okkara partur hevur verið so lítil. Árið í fjør prógvaði, at tað bar til hjá okkara fiskiflota at fiska okkara eginkvotu upp eftir stuttari tíð. Tað er nú, vit skulu leggja grundarlagið undir tí, sum liggur fyri framman. Taka vit ikki av hesum møguleika, er ógvuliga skjótt, at vit kunnu koma út sum hin minsti parturin í einum komandi býti millum londini, sigur Jacob Vestergaard**




Vilmund Jacobsen

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, hevur fyrr í hesi vikuni gjørt av, at føroyska eginkvotan av makreli í 2011 verður 150.000 tons tilsamans. Áður hevur landsstýrismaðurin sagt, at kravið hjá føroyingum er 15%, men tey 150.000 tonsini, sum hann nú hevur tillutað føroyingum, svara til umleið 23% av teirri heildarkvotu, sum ICES tilmælir fyri fiskiárið 2011.



*- Eg meti, at tað er okkara skylda at skapa okkum besta grundarlagið undir einum nýggjum býtislykli, sigur Jacob Vestergaard*

Áðrenn vit fara víðari, kunnu vit leggja aftrat, at í avtaluni frá 2009, tá strandalondini seinast samdust um býtið, lá føroyski parturin av heildarkvotuni á sløkum 5%.

## Tóku rívan til

Men hví hevur landsstýrismaðurin nú ásett Føroyum ein so stóran part av kvotuni, sum liggur heili 13% omanfyri tey 15%, sum kravið til samráðingarnar hevur verið?

– Føroyar vóru seinasta landið í hesum sonevnda samstarvi at áseta sær sína kvotu. Hetta gjørdu vit ikki, fyrr enn allir møguleikar at finna semju vóru troyttir. Ísland ásetti sær sína kvotu, tá teir í samráðingarumfari sóu, hvønn veg tað bar, og at teir ikki fóru at vera hoyrdir. Íslendska eginkvotan av makreli fyri árið í ár liggur um 146.000 tons.

Jacob Vestergaard vísir á, at beint eftir Íslandi ásettu ES og Noreg sær eisini sínar kvotur, og hesi stóru londini tóku rívan til.

– Av eini tilmæltari heildarkvotu á 646.000 tons, lótu ES og Noreg bert 10% av heildarkvotuni vera eftir til Ísland og Føroyar, meðan tey sjálvi kannaðu sær tey 90%.

Landsstýrismaðurin sigur, at við teimum kvotum, sum hini strandalondini hava ásett sær og tí prosentparti, sum Føroyar hava krav um, er væntandi, at samlaða veiðan eftir makreli í ár fer at tátta í eina miljón tons.

– Tað er út frá hesum tali, at eg havi tillutað Føroyum eginkvotu á 150.000 tons, sum svarar til 15% av einari miljón tonsum.

## Vit meina tað

Jacob Vestergaard vísir á, at nógv hevur verið frammi um, at londini í ES, sum fiska eftir makreli, eitt nú Spania, slett ikki halda seg til sínar kvotur. Talan hevur verið um stóra útblaking og nógv tons, sum slett ikki verða skrásett.

– Soleiðis hava lond í ES fiska út við 100.000 tons útyvir tað, sum tey høvdu kvotur til. Hetta er eisini prógvað við frágreiðingum, sum ICES hevur gjørt. Vit vita eisini um rættarmál móti skotskum reiðaríum, sum hava fiskað meiri av

